# Føroya løgmaður heilsar Mandela á føðingardegnum

## Mandela 90 ár

**Jan Müller**

Úr øllum heiminum streyma inn føðingardagsheilsanir til Nelson Mandela, sum fyllur 90 ár í dag. Eisini úr Føroyum.

Jóannes Eidesgaard hevur vegna landsstýrið og Føroya fólk sent føðingardagsheilsan. Løgmaður skrivar m.a.:

– Vit, sum búleikast her í Norðuratlantshavi, eru vorðin hugtikin av og hava fingið íblástur frá tygara serstøku avrikum. Við stórum persónligum offrum stríddist tygum fyri rættvísi, tá alt tóktist at vera vónleyst. Tygara sigur var ein orsøk til, at vit kundu styrkja okkum í trúnni á, at rættvísi sigrar.

Løgmaður skrivar víðari, at hesin stóri dagurin, gevur okkum øllum eitt høvi til at vísa, hvussu fegin vit eru um, at Mandela er millum okkum. Hann rósar eisini Mandela fyri tað arbeiði hann hevur gjørt og framvegis ger til frama fyri eitt nú HIV- og Aidsraktum børnum.



FÖROYA LÖGMADUR

18 July 2008

Nelson Mandela
Private Bag x70000
Houghton
2041
South Africa

Birthday Greetings to Madiba

On behalf of the Government and People of the Faroe Islands, I would like to send our warmest and most heartfelt congratulations to you on the occasion of your 90th Birthday.

As in so many other places in the world, the people of our small country in the North Atlantic Ocean have been touched and inspired by your unique achievements. At great personal cost, you battled for justice when the odds seemed impossible. Your eventual triumph was a cause for reaffirming our belief that right will prevail.

The milestone of your 90th Birthday gives us an opportunity to express just how much we value your presence amongst us. You radiate a wisdom, warmth and humanity that truly is a blessing for the world. And we are further inspired by your continuing commitment to improving the lot of deprived children and HIV/Aids victims.

Wishing you the happiest of Birthdays and Many, Many Happy Returns of the Day.

Jóannes Eidesgaard
Prime Minister
Faroe Islands



Jóannes hittir Nelson Mandela 16. mars 1999 á Cristiansborg